# fantastiska væl”





*Eivør Pálsdóttir sang tvey løg*



*Fuglfirðingar høvdu ikki vant síðani á jólum*



## Stuttlig og góð konsert í Gøtu

Í sambandi við kórstevnuna 2006, var konsert í Gøtu Kirkju. Millum annað sang Eivør Pálsdóttir tvey sololøg saman við felagskórinum

*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Felagskórið Gøta/Leirvík og Kórsamband Føroya skipaðu fyri kórstevnuni 2006. Hetta var fyrstu ferð síðan í 2000, at kórstevnan aftur verður hildin eftir gamla mynstrinum yvir fleiri dagar.

Endabresturin í sambandi við kórstevnuna var í Gøtu Kirkju í gjár, tá einstøku kórini, Felagskórið og Eivør Pálsdóttir høvdu konsert. Umframt felagskórið upptraðkaði eisini Felagskórið Gøta/ Leirvík, Glymur, Fuglfirðingar, Ljómur, Kristiliga Kórið og Kórið hjá Jóhan.

Sambært Dáva Winther, vildi onkur vera við, at besta kórið vóru Fuglfirðingarnir, sum ikki hava vant síðani á jólum – teir átta við mentamálaráðharranum á odda.

– Tá skal varða sagt, at kórstevnan snýr seg ikki um at vera best, sigur Dávur, sum eisini greiddi frá, at Samson í Lambanum undirhelt við, at teir dugdu bert jólasangir, og tí ætlaðu at byrja við sanginum Jólastjørnan.

– Tað var somikið skemtiligt í kirkjuni, at takið hevði hug at fara upp frá sum láturin rungaði, sigur Dávur. Og hann heldur fram, at hetta var hóast deknurin las upp reglur fyri, at ikki var loyvt at klappa í kirkjuni.

– Men hann nevndi einki um, at tað var loyvt at flenna hart, og tað bleiv tað í ríkiligt mát, tá ið Samson greidd frá teirra virki. Kórið sang Nánd og eisini eitt lag eftir Jógvani á Lakjuni við orðum av Victor Danielsen, sigur Dávur Winther at enda.